# Jamen, hví øsir Høgni Hoydal seg upp?

ROLF GUTTESEN



**Spurningurin er, hví HH øsir seg so upp um eina viðmerking, sum eg skrivaði um túrin hjá Jørgen Niclasen í Íslandi? Hvørji eru ørindi hansara? Loyvt er at spyrja, tí har man liggja meira aftanfyri, enn mínar smáu viðmerkingar**

Fyrst má eg siga, at tað er løgið, at hann brúkar ein tiltaluform, eins og hann yvirhøvur ikki kendi meg. ”*Ein, ið nevnir seg Rolf Guttesen…*” Tað er ikki meira enn nakrar vikur síðani vit møttust úti á Reyni, hann tosaði um lásasmiðir, eg fortaldi honum um byggiháttin við bindingsverk og flensburg-steinum í Egholmshúsi í Reynagarði, vit stóðu beint undir. Eg trúði tá, at hann visti, hvønn hann tosaði við. Eg havi kent Høgna síðan hann varð føddur.

**Spilla út, ótespiligt?**
Eg kallaði Jørgen Niclasen óroyndan, og tað er hann. Nýggjur sum floksformaður, og nýggjur sum landsstýrismaður í uttanlandsmálum. Eg kallaði hann lærling, og einki ilt er í tí. Ein lærlingur hevur – sum oftast – evnini og hugin at læra. Kanska síggja vit Jørgen sum útlærdan svein um nøkur ár?

**Politikarar eru og vilja gjarna vera almennir persónar**
Eg havi ”*spilt navngivin og ónavngivin tjóðveldisfólk út*”. HH man vera blivin nakað fíntfølandi eftirhondini. Eg havi kritiserað **politikkin** hjá Tjóðveldisflokkinum. At man so noyðist at nevna persónar, sum bera politikkin fram, tað kann ikki vera ”útspilling”. Tað má vera so, at fólk, sum alment fara upp í politikk, arbeiða, skriva og tala fyri hesum, tey mugu vænta og tola at fáa aftursvar. Politikkarar eru almennir persónar, og royna sjálvir – sjálvandi – at blíva so ”almennir” sum gjørligt.

Eisini er tað loyvt at viðgera søguligar persónar, sum hava ført seg fram. Nøvn, sum hava borið ein politikk fram. Annars kann man ikki ”læra av søguni”, sum er ein vanligur og skilagóður talimáti. Eg havi ikki útspilt ”*fólk, ið eru farin higani av fold*”. Tað sum helst pínir HH er, at eg fyri einum tveimum árum síðani vísti á, at Jóannes Patursson í 1930-num hevði tætt samband við fascistiskar bólkar í Norra, millum annað við Adolf Hoel. Og tað kann dokumenterast!

**Eg havi ikki spilt íslendsku tjóðina út**
HH tekur ”frástøðu frá hesi útspilling av .. íslendsku tjóðini”. Nei, nú dugi eg slett ikki at fylgja við. Eg havi skrivað um íslendskan politikk, og sendistovurnar. Eg fari at biðja harra Hoydal greiða lesarum frá, hvar og hvussu eg havi spilt íslendsku tjóðina út. Tað kundi aldri fallið mær inn.

**Ikki skilagott við sendistovum í íslendskum hølum**
Ørindi míni vóru at siga, at tað ikki er skilagott at hava sendiumboð í somu stovu, sum eitt fremmant land. Eitt annað suverent land, sum hevur síni áhugamál at røkja. Eitt land, sum Føroyar stríðist við, bæði um tilfeingið í havinum, og um sølumarknaðir. Eitt er í veitslutalum at røða um ”brøðratjóðir”, annað er at tryggja egnar strategiskar interessur.

**Politiskt neyðarróp frá Høgna Hoydal**
Men hví øsir HH seg upp og forsvarar ein landsstýrismann úr Fólkaflokkinum? Mín vurdering gongur tann vegin, at hetta er eitt politiskt neyðarróp frá HH. Hann er politiskt í dýrastu neyð.

Hansara fullveldislandsstýri saman við Anfinn Kalsberg, spældi fallitt. HH bleiv kasseraður av Anfinni.

CHE-landsstýrið saman við Jóannes Eidesgaard spældi eisini fallitt. HH bleiv koyrdur við skoðsmálinum: óálítandi.

**Tjóðveldi í politiskari oyðimørk**
Kasseraður tvær ferðir, av bæði høgra og vinstra er ein politisk katastrofa fyri HH persónligt. Ikki minst tí fólk í flokkinum duga at síggja, at skal Tjóðveldisflokkurin aftur sleppa upp í part, so skal ein nýggjur formaður til.

HH berjist fyri sínum politiska lívi. Tí krøkir hann seg upp í Fólkaflokkin, sum í løtuni hevur ”ein óroyndan lærling” sum formann.

# Partapolitisk sjúka komin í fíggjarstýringina

TÓRBJØRN JACOBSEN



Felagið Valcon hevur gjørt eina fíggjargreining av føroyska sjúkrahúsverkinum. Orsøkin til tað er, at Tjóðveldi og Miðflokkurin í CHE-samgonguni ikki framhaldandi kundu liva við áhaldandi meirnýtslu, yvirtrekkum, eykajáttanarumbønum og framskrivingum av yvirdráttum. Nú frágreiðingin, á 80 síður, er liðug og almannakunngjørd, er greitt, at landsstýrismaðurin Hans Pauli Strøm lesur hana sum hin versti lesur Heilagu Skriftirnar. Útvarpið er sjálvandi preparerað í góðari tíð, nú einasti politiski, ella rættari partapolitiski, boðskapurin er, at føroyingar brúka minni fíggjarliga orku til sjúkrahúsverkið enn grannarnir gera. Javnaðarflokkurin og landsstýrismaðurin kreeraðu stuntið, og heimastýrisradiofoniin legði seg fram eftir rommum, og kíkaði subjektiva boðskapin karráan.

Niðurstøðan í kanningini er ein lemjandi atfinning av landsstýrismanninum, umsitingini í ráði hansara og ditto í sjúkrahúsverkinum. Endasalutturin í niðurstøðuni, ið er skrivað á síðu 1, harvið rímiliga ásýnilig, er soljóðandi á donskum: ”**Under budgetanalysens givne forudsætninger bør der derfor være væsentlige proces- og ressourcemæssige forbedringsmuligheder fra den politiske budgetproces til den daglige styring af sygehusenes økonomi. Sammenfattende er det vurderingen, at der er et ikke ubetydeligt potentiale for øget budgetdisciplin, større overblik over udgiftsdrivende faktorer, bedre styring og øget produktivitet**.”

Landsstýrismaðurin, og harvið flokkur hansara, eru komin í dýrastu neyð av kanningini. Alment sleppur hann í mikrofonhaldarínum at tosa elegant um alt annað enn tað, sum kanningin snýr seg um. Tað tykist, sum ongin er førur fyri at seta honum spurningar í mun til tað sum kanningin er gjørd um og til. Einfaldi boðskapurin er nú, at vit brúka minni orku til sjúkrahúsverkið enn danir, íslendingar o.a., hetta snýr kanningin seg als ikki um, og tað var heldur ikki ætlanin við henni. Hon snýr seg heilt einfalt um, hvussu fíggjarstýringin í verkinum, heilt frá landsstýrismanninum, út í liðirnar á sjúkrahúsunum, stendur, í mun til játtaða fíggjarkarmin á løgtingsins fíggjarlóg. Onki annað. Niðurstøðan omanfyri er ein lemjandi kritikkur í mun til hendan spurningin, sum var ætlaður skuldi svarast, og er svaraður.

Hvussu kvaliteturin á føroyskum sjúkrahúsum er í mun til aktuellu játtanina vita vit ikki. Tann kanningin er ikki gjørd, tað átti hon at verið alt fyri eitt, soleiðis at politikkararnir, sum skulu játta peningin, veruliga vita, hvussu játtan og kvalitetur, í einum og sama høpi, standa í mun til tey londini, sum landsstýrismaðurin selektivt, partapolitiskt subjektivt og við ongum grundmateriali er farin at gera seg klókan uppá í fjølmiðlunum. Kanningin sigur greitt, at landsstýrismaðurin als ikki hevur fyrisitið sítt embætið á nøktandi hátt. Jóannes Eidesgaard megnaði onki at gera við partamannin, hvørki í fyrru ABC-samgonguni, tíansheldur í CHE-samgonguni og nú er spurningurin bara, um Kaj Leo torir at nema HPS við einum klova, ella rættari, um hann sleppur til tað fyri Javnaðarflokkinum. Tað spyrst um livst.

# Å stakkals Elin Heinesen!

KITTY MAY ELLEFSEN



Í hesum døgum lesa og hoyra vit nógv um fólk, bæði í Føroyum og uttanlands, sum knógva undir altjóða kreppuni. Her heima hoyra vit dag og dagliga um hópuppsagnir í fiskivinnuni bæði á sjógvi og landi, um tey í Suðuroynni, sum ikki sleppa til arbeiðis, um tey á Kósini, sum óttast fyri at missa arbeiði, um fiskimenn sum flýggja av landinum, um uppsagnir í byggivinnuni og nógvar aðrar syrgiligar søgur.

Mitt í øllum sorgarleikinum skulu vit eisini lesa um ein almennan stjóra, sum skrivar síðu upp og síðu niður, meðan hon grætur um sína soltnu løn áljóðandi 39.215,79 pluss 15% í eftirløn.

Ikki sørt niðursetandi samanber almenni stjórin sína løn við eina arbeiðsmannaløn. Hetta tí, at hon skal eitast at arbeiða umleið 70 tímar um vikuna.

Almenni stjórin samanber seg við føroyska arbeiðaran, sum í dag líður undir hóttafallinum av altjóða kreppuni. Hesin sami arbeiðarin vildi óivað fegin sloppið at arbeitt 70 tímar um vikuna, eins og Elin. Serliga nú tað stundar ímóti jólum. Men arbeiðarin skal vera glaður, um hann yvirhøvir fær eina arbeiðsviku áljóðandi 40 tímar.

Almenni stjórin gloymir, at hesin sami arbeiðarin, sum hon so niðrandi samanber seg við, bæði skal gjalda lønina hjá Elin, samstundis sum arbeiðarin skal bera byrðarnar av kreppuni.

Kreppuni, sum Elin óivað ongantíð kemur at merkja nakað til.

# Mangur veit frá Ólavi kongi at siga, men hevur ikki sæð hann

SOFUS DEBES JOHANNESEN



Nakað soleiðis minnist eg eitt orðafelli. Og um eg minnist hetta rætt, so sigur tað alt um mína kenslu eftir lansfundin hjá Javnaðarflokkinum 14. og 15. november í Klaksvík.

Var ikki meira enn rættiliga vaknaður eftir landsfundarveitsluna, tá Jógvan Arge, tjóðveldismaður í Havn, rópti út um geilar, hvussu skakaður hann var um tey úttalilsir, sum fallin vóru á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum um Tjóðveldi.

Og so var helst kreppufundur í tingbólkinum hjá hesum sama flokki um hetta mál. Úrslitið gjørdist, at Sjúrður Skaale vegna skelkaða tingbólkin kom við enn einari fordøming av landsfundi Javnaðarfloksins, sum allan vegin ígjøgnum hevði tosað niðrandi um tey.

Endaligi trumfurin varð spældur hósdagin, tá ein danskløntur embætismaður, sum helst hevur høgt starv í stjórnini hjá Tjóðveldi, í bløðunum greiddi okkum øllum frá, at ”gjøgnumgangandi á landsfundinum hjá Føroya Javnaðaðarflokki vóru skuldsetingarnar og runublaking móti Tjóðveldinum”

Eg má siga, at eg kenni meg illa við.

Eg var á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum alla tíðina, men eg kenni onki av øllum hesum aftur.

OK, formaður floksins endurtók, at vantandi álit millum hann og formann Tjóðveldis var orsøkin til, at CHE samgongan slitnaði, men í sama andadrátti segði hann, at samstarvið við hini landsstýrsfólkini og tingmanning Tjóðveldisins vóru stak góð.

Men alt annað, ið síðani er ført fram, er so langt úti, at man stendur spyrjandi og yppur øksl.

At skjótt fyrrverandi varaborgmeistarin í Havn er í ringum skørðum eftir nirðrandi valið, har hann ”bert” gjørdist nr. 3 millum tey, ið vórðu vald, kann man kanska skilja.

Men at Sjúrður Skaale, sum vanliga førir seg fram sum tann mest reiðiligi politikarin í Føroyum, og tekur sær rætt at revsa øll onnur fyri óreiðiligheit, soleiðis loypir upp í óðum verkum, skilji eg als ikki.

At so hesin danski embætismaðurin loypur upp á tjóðlegg fyri so at detta niður aftur á langlegg, er kanska meira skilligt. Hetta er ikki fyrstu ferð, at hann skjýtur til høgru og vinstru uttan mál og mið, so har er ikki nakað nýtt undir sólini!

Samanumtikið kunnu vit bert enn einaferð taka saman um Tjóðveldið: Ússaligt!